Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Edva Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Viðlíkahald av vegastrekkinum niðan gjøgnum dalin í Norðragøtu og inn eftir Kambsdali

Spurningar:

1. Nær er vegastrekkið frá Norðragøtu og inn eftir Kambsdali asfalterað seinast?
2. Hvussu ofta er vegastrekkið asfalterað av nýggjum seinastu 30 árini?
3. Nær er ætlanin at viðlíkahalda hetta vegastrekkið?
4. Hvar í røðini er hetta vegastrekkið í einari asfalteringsætlan hjá Landsverki?

Viðmerkingar:

Vegastrekkið niðan ígjøgnum dalin í Norðragøtu og inn eftir Kambsdali er eitt strekkið við sera nógvari ferðslu. Tað er nógv vinnulív á Kambsdali og Fuglafirði, umframt at tað liggur ein stórur Miðnámsskúli í sama øki. Sostatt er eisini nógv tung ferðsla, sum setur eyka krøv til eitt trygt vegastrekki.

Vegurin er so mikið illa farin, at bilar royna at stýra uttan um holini í vegnum, fyri at koma nøkulunda ígjøgnum hetta strekkið. Hetta er tarnandi fyri ferðsluna og ikki gott fyri ferðslutrygdina.

Tað eru nógvir vegir, sum treingja til ábøtur runt um í landinum, men í hesum økinum er nógv vinnulív, tað ferðast fleiri hundrað næmingar hvønn dag, umframt øll onnur ferðsla.

Hesar vánaligu koyriumstøður eru til stóran ampa fyri ferðsluna, her ímillum ferðslutrygdina. Tí verður hesum fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 14. september 2022

Edva Jacobsen